# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Fryntligi Kerr kann vera eisini verða grótharður

**Brian Kerr er ein dugnaligur venjari, og hann er ein fryntligur persónur. Men hann kann verða harður við spælarar, sum koma upp á tvørs, sigur írskur ítróttarjournalistur**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Tað líkist einum reinum plettskoti frá FSF, nú Brian Kerr er settur í starv sum føroyskur landsliðsvenjari í fótbólti*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

Brian Kerr hevur eitt gott umdømi í Írlandi, og hann hevur góð úrslit at vísa á.

Tað sigur Emmet Malone, sum er ítróttarjournalistur á stóra írska blaðnum Irish Times.

- Eftir at hann gavst sum landsliðsvenjari, hevur Brian Kerr ikki viljað tikið nakað írskt felag á seg, tí hann hevur helst hildið tað verið eitt afturstig fyri seg. Kerr hevur verið upp á tal til ymisk størv í Onglandi og Skotlandi, og eitt skifti varð tosað um, at hann skuldi verða leiðari fyri ungdómsdeildina hjá Liverpool, sigur Emment Malone við Rás2.

- Kerr verður mettur sum ein venjari, sum dugir at skipa síni lið. Hann dugir væl at fáast við ungar spælarar, og írskir spælarar sum Robbie Keane og Damien Duff hava nógv gott at bera honum. Hann hevur havt stóra ávirkan á teirra yrkisleið.

Emmet Malone sigur, at sum persónur er Brian Kerr sera fryntligur og lættur at fáast við, men hann kann eisini verða harður við sínar spælarar.

- Tá hann hevur havt ósemjur við sínar spælarar, hevur hann havt ilt við at fyrigeva teimum, sigur Emmet Malone, sum heldur, at føroyingar fara at verða glaðir fyri Brian Kerr.

# Gleðir seg til avbjóðingina

**Tað var ein spentur Brian Kerr, sum í gjár settist í sessin sum føroyskur landsliðsvenjari. Avbjóðingin er ovurstór, men sjálvur sigur venjarin, at honum dámar væl í leiklutinum sum underdog**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Frá teirri løtu, at eg av fyrstan tíð tosaði við Høgna í Stórustovu og Ísak Mikladal, var eg imponeraður av tí, sum gongur fyri seg í føroyskum fótbólti. Ambitiónirnar og viljin hjá teimum at flyta føroyskan fótbólt tosa fyri seg, og tað er mín vón, at eg kann vera við til at røkka hesum málum.

- Eg havi eisini sjálvur upplivað, hvussu nógv føroyska fólkið leggur í fótbóltin. Eg var her sum venjari hjá Írlandi, og ta ferðina høvdu vit sera trupult við at fáa ein sigur til høldar.

Nýggi føroyski landsliðsvenjarin, Brian Kerr, staðfesti alt fyri eitt mánamorgunin, at hann er ovurfegin um nýggja starvið, sum hann nú hevur fingið.

## Úrslitini telja

Eitt er at byrja slíka móttøku við at rósa nýggju arbeiðsgevarum sínum. Hetta sorterar kanska bara undir vanliga fólkaligheit. Men samstundis læt Brian Kerr ongan iva vera um, at hann er komin til Føroya fyri at fáa úrslit.

- Fótbóltur snýr seg um úrslit, men í altjóða høpi eru tey ikki lætt at fáa. Eg eru varugur við tað góða arbeiðið, sum Jógvan Martin Olsen, Allan Simonsen og Henrik Larsen longu hava gjørt, og mítt mál er at betra um tey úrslitini, sum eru komin.

- Tað kann væl vera, at tað verður trupult í einum bólki, sum telur londu sum Serbia, Frakland og Rumenia. Men tit hava longu fingið eitt fantastiska gott úrslit móti Eysturríki, og sjálvur dámar mær leiklutin sum underdogs. Tað merkir, at vit skulu stríðast fyri okkara møguleika, og hesum havi eg einki ímóti, staðfesti Brian Kerr millum annað, tá hann í gjár hevði sett sína undirskrift á sáttmálan við FSF.

## Bárður vil vinna the Treble

Bárður B. Mikkelsen og liðfelagarnir í Marienlyst Volley hava spælt seg í DM-finaluna í flogbólti

Undan hesum hevur Marienlyst vunnið donsku steypakappingina og NM-heitið fyri feløg, og vinna teir eisini danska meistaraheitið, verða teir fyrsta danska flogbóltsfelagið, sum vinnur øll hesi steypini í einum og sama kappingarári.

Í hálvfinalunum í DM-kappingini spældi Marienlyst tríggjar dystir móti Middelfart, og tá Marienlyst vann tveir av hesum, var finaluplássið tryggjað. Í finaluni skulu teir spæla móti Aalborg HIK.

Fyrsti finaludysturin verður spældir í Aalborg skírishósdag klokkan 15 føroyska tíð, og næsta finalan verður í Odense 15. apríl klokkan 19.

Verður neyðugt við einum triða finaludysti, fær Marienlyst fyrimun av heimavølli í hesum, tí felagið endaði frammanfyri Aalborg HIK.



*Bárður B. Mikkelsen ivaðist, um hann skuldi taka eitt ár afturat í fremstu donsku flogbóltsdeildini. Við tveimum gullmerkjum og plássi í DM-finaluni er helst eingin ivi um, at spælarin í dag er fegin um avgerðina, sum hann tók seinasta summar*